LM-065/2023

FYLGISKJAL 9

Landsfelag Pensjónista

Argir 05.12.2023

Almanna- og mentamálaráðið

Verður sent við telduposti til ammr@ammr.fo

HOYRINGSSVAR

Almanna- og mentamálaráðið hevur sent Landsfelag Pensjónista til ummælis:

Uppskot til
Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp
(Árlig prístalsjavning, lægri kringvarpsgjald fyri smærri virki, stovnar v.m. og broyting í kringvarpsgjaldinum fyri likamligar persónar)

Landsfelag Pensjónista hevur hesar viðmerkingar:

Landsfelag Pensjónista skilir væl og tekur undir við, at kringvarpsgjaldið verður prístaljavnað.
At gjaldið skal hækka soleiðis, at pensjónistar skulu rinda eina hækking uppá 26%, meðan tey undir pensjónsaldur skulu rinda eina hækking uppá 8,67%, er ikki at viðgera fólk eins, tvs. at pensjónistarnir skuldu eisini goldið 8,67%.
Verandi kringvarpsgjald hjá pensjónistum varð ásett í samband við lækkingini í grundupphæddini í fólkapensjónini í 2016, og átti tí ikki at hækka so nógv sum ætlanin er í hesum uppskotinum.
At áleggja pensjónistum eina hækking í kringsvarpsgjaldinum samstundis, sum smærri stovnar og virki fáa eina lækking, hongur sbrt. Landsfelag Pensjónista ikki saman.
Vit mæla frá, at pensjónistar, sum verða knokkroyttir fíggjarliga frammanundan, skulu rinda eina lutfalsliga størri hækking í kringvarpsgjaldinum enn hini, og mæla samstundis til, at smærri stovnar og virki rinda tað, sum restar í fyri at fáa tað fíggjarliga uppá pláss, tá tað snýr seg um at prísjavna kringvarpsgjaldið.

Vinarliga

v. Landsfelag Pensjónista

Beate L. Samuelsen, forkvinna